# Broytingar í ferðslulógini

**Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í ferðslumálum, sigur, at tað fara at koma broytingar í ferðslulógini við atliti til álitið um Null hugsjónina hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sum var fyri í tinginum týsdagin**

FERÐSLUTRYGD

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Bjarni Djurholm og vinnumálaráðið fara nú undir ítøkiligar broytingar í ferðslulógini við atliti til Null hugsjónina hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd*

*Savnsmynd*

Landsstýrismaðurin boðaði sjálvur tinginum frá, at vinnumálaráðið fer at koma við nøkrum broytingaruppskotum í ferðslulógini.

Tey eru farin í holt við at fyrireika eitt royndarkoyrikort til tey ungu, og í tí sambandinum eina stigaskipan, har um ein fremur eitt brot á ferðslulógina, so antin missir ella fær ein so og so nógv stig, sum um ein heldur fram at bróta lógina, endar við, at ein missir koyrikortið.

– Vit hava ikki endaliga tikið avgerð um eitt ávíst stigatal verður tillutað bilføraranum, og um hann so missir øll stigini tá missir koyrikortið. Ella um vit seta eitt hámark fyri, hvussu nógv stig ein kann fáa, áðrenn koyrikortið verður tikið. Men tað gongur út upp á tað sama, greiðir landsstýrismaðurin frá.

Hendan skipanin verður nýtt í nógvum londum rundan um okkum, og nú er Vinnumálaráðið sum sagt farið í gongd við hetta eisini.

Eisini er ein nýggj kunngerð fyri koyrikort á veg, sum fer av álvara at stramma upp í krøvunum um at fáa koyrikort – bæði hvat viðvíkur teori og koyring.

Í hesi kunngerð er onki krav um eina hálkubreyt, men har stendur, at innan fyri eitt ár eftir, at kunngerðin er komin í gildi, skulu næmingarnir koyra á einum lukkaðum øki. Ella við øðrum orðum í einum grulvugarði. Og harafturat hava tey sett sær fyri at kanna og útgreina møguleikarnar fyri einum koyritekniskum øki. Tað vil siga eina hálkubreyt ella líknandi, har næmingar kunnu venja seg at koyra uttan at órógva ferðsluna.

### Promillan til umhugsan

Í Null hugsjónini verður mælt til, at promillumarkið verður lækkað niður í 0,2 %. Hetta hevur vinnumálaráðið ikki tikið endaliga støðu til enn, men landsstýrismaðurin sigur, at tað umhugsa tey í løtuni.

– Null hugsjónin eru nógv tilmæli, sum eru løtt at føra út í lívið, har ímillum promillumarkið, so tað hugsa vit um. Tað verður kanska ikki í ár, men tað taka vit so í øllum førum undir við, sigur Bjarni Djurholm.

Hann sigur, at fyri tveimum árum síðani setti Vinnumálaráðið sær sum mál at broyta alla ferðslulógina. Men í dag ásannar hann, at tað helst var ein ov stórur biti at gloypa.

– Vit meta tað er betur at broyta lógina stigvíst, har Null hugsjónin er endamálið enn at taka alla lógina í einum, sigur hann.

### Gott orðaskifti

Bjarni Djurholm sigur, at Null hugsjónin hevur sera mong tilmæli, og tískil var nógv at ríva í undir orðaskiftinum á tingi.

Men hann sigur, at allir flokkar á tingi hava áhuga fyri hesum, og tí var orðaskiftið bæði gott og uppbyggjandi.

Men samstundis so ásannar landsstýrismaðurin, at óansæð hvat skal gerast, so skal orka og pengur til. Serliga við atliti til landsverkfrøðingin og broytingar í vegakervinum.

# "Dyr" listaframsýning í Leikalund

**Astrid Andreasen, Tita Vinther og Guðrið Poulsen, tríggjar listakvinnur úr Havn, vitja í næstum Leikalund í Klaksvík við framsýningini, sum tær kalla "Dyr"**

LISTAFRAMSÝNING

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Ein forvitnislig listaframsýning letur upp í Leikalund fríggjadagin 16. apríl klokkan 16. Tað eru tær tríggjar Guðrið Poulsen, Astrid Andreasen og Tita Vinther, sum sýna fram teirra listarverk*

**Klaksvík:**
Frá 16. apríl til 14. mai verður ein listaframsýning í Leikalund. Tað eru tær tríggjar Astrid Andreasen, Tita Vinther og Guðrið Poulsen, sum sýna fram list tann komandi mánaðin í Klaksvík.

Talan er um eina øðrvísi framsýning undir heitinum "Dyr", sum fer at hanga uppi í gomlu hølunum hjá Norðoya Fornminnissavni. Leikalund hevur lænt hølini til hesa framsýningina, og tað eru tær tríggjar sera fegnar um.

– Hetta má vera eitt tað besta hølið í landinum til slíkar framsýningar, sum okkara. Tí tað er so rátt og hóskar væl til lutirnar hjá okkum, greiða tær frá.

Framsýningin letur upp fríggjadagin 16. apríl klokkan 16, har øll eru hjartaliga vælkomin at hyggja inn, síggja framsýningina og fáa ein kaffimunn. Høvi verður eisini at heilsa uppá tær tríggjar hendan dagin. Eisini verður í hesum sambandi hornframførsla, har tær tríggjar Joan Purkhús, Martha Hansen og Sunnvør í Kongsstovu úr Musikkskúlanum í Klaksvík fara at framføra.

Listaverkini eru til sølu og eru annars at síggja í vanligari upplatingartíð frá mánadegi til fríggjadag frá 10 til 17.30 og leygardag frá 10 til 13. Framsýningin verður hangandi tær fýra vikurnar til 14. mai.

### Drúgvar royndir

Í 2002 fóru tær tríggjar undir fyrstu verkætlanina "Dyr". Tað var ein útiframsýning í Grasagarði í sambandi við Listastevnu Føroya. Hetta var fyrsta útiframsýning av sínum slagi í Føroyum, og varð hon væl fagnað av áskoðarunum. Síðani var framsýningartiltakið víðkað, og á sumri 2003 framsýndu tær saman við trettan íslendskum listakonum í Lystigarði Akureyrar, ein botaniskur urtagarður miðskeiðis á Akureyri. Hendan framsýningin kallaðist 13 + tríggjar. Á heysti 2003 framsýndu Astrid, Tita og Guðrið á Gallerí Oynni á Tvøroyri.

Astrid, Tita og Guðrið hava regluliga havt framsýningar saman seinastu 10-15 árini.

Astrid er fødd í 1948. Hon er útbúgvin handarbeiðslærari og ítrivsvegleiðari og hevur harumframt nomið sær útbúgving innan myndaveving, grafikki og vísundliga myndskreytingartøkni. Hon hevur rikið egið verkstað í Havn síðani 1979. Astrid hevur luttikið á samsýningum í Føroyum og í øllum Norðanlondum og havt einkarsýning á millum annað Danmarks Akvarium. Harafturat hevur hon teknað mong frímerki og jólamerki og myndprýtt bøkur.

Tita er fødd í 1941. Hon hevur arbeitt við myndaveving, spinning og liting í út við fjøruti ár. Útbúgving sína hevur hon millum annað frá donskum vevskúla. Eisini hon stovnaði egið verkstað í Havn í 1979. Tita hevur myndprýtt kommunalar bygningar, bankar, sparikassar og kirkjur um alt landið. Hon hevur millum annað luttikið á mongum samsýningum í Føroyum, Norðanlondum og í Baltikum. Í 1995 umboðaði hon Føroyar á norðurlendskari listastevnu á Álandi.

Guðrið er fødd 1961. Hon er útbúgvin keramikari í Finlandi og Íslandi og læt upp egið verkstað í Havn 1987. Hon hevur luttikið á mongum samsýningum saman við føroyskum listafólki og hevði einkarsýningina "Spor" í Listaskálanum í fjør. Annars hevur hon myndprýtt almennar og privatar stovnar í Føroyum.



# Null-hugsjónin má nærri teimum ungu



*– Hugskotið um eitt royndarkoyrikort fer avgjørt at gera mun. Um vit ímynda okkum, at koyrkortið verður eitt slag av klippikorti við fimm klippum, eri eg sannførd um, at tey ungu fara at ansa betri eftir. Hvørja ferð eitt klipp rýkur, verður tað ein heilt ítøkilig áminning um avleiðingarnar av, at bera seg ábyrgdarleyst at í ferðsluni. Sum er, liggur koyrikortið alt ov trygt í lummanum hjá okkum øllum, siugr Olga Østerø, yngsti koyrilærari í Føroyum*

**Vit eiga at ansa eftir, at orðini í nýggja ávaringarátakinum ikki gerast so stór, at tey missa sína meining og ikki raka tey ungu longur, sigur Olga Østerø, ið er yngsti koyrilærari í Føroyum**

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

33 ára gamla Olga Østerø úr Klaksvík er yngsti koyrilærari í Føroyum. Hon hevur verið í starvinum í 11 ár, og meginpartin av tíðini hevur hon verið einasta føroyska kvinnan í hesum yrkinum.

Olga hevur gjørt sær nógvar tankar um, hvat skal til, fyri at fáa ungar bilførarar at hugsa seg betri um í ferðsluni. Men hon undrast yvir, hví koyrilærarar so sjáldan verða tiknir við uppá ráð, tá nýgg átøk um ferðslutrygd verða sett í verk.

### Dagføra koyrikortið.

- Vit koyrilærarar eru tætt saman við teimum ungu bilførarnum hvønn dag. Vit hoyra, hvat tey tosa um, og um vit tíma at lurta, kunnu vit fáa eina rættiliga góða mynd av, hvat kann fáa tey at rakna við og vera meir varin.

- Hugskotið um eitt royndarkoyrikort fer avgjørt at gera mun. Um vit ímynda okkum, at koyrikortið verður eitt slag av klippikorti við fimm klippum, eri eg sannførd um, at tey ungu fara at ansa betri eftir. Hvørja ferð eitt klipp rýkur, verður tað ein heilt ítøkilig áminning um avleiðingarnar av, at bera seg ábyrgdarleyst at í ferðsluni. Sum er, liggur koyrikortið alt ov trygt í lummanum hjá okkum øllum.

- Øll koyrikort áttu at verðið dagførd við jøvnum millumbilum, tí tað er ógjørligt hjá okkum koyrilærarum at fyrireika næmingarnar uppá hvørja tí einastu støðu, tí kanst koma í í ferðsluni. Tað er ikki fyrr enn tey ungu sjálvi sleppa út í ferðsluna uttan koyrilærara, at tey skulu læra seg at koyra bil.

- Eg upplivi javnan, at bæði yngri og eldri bilførarar ringja til mín og greiða mær frá onkrari støðu, tey hava verið í, og har tey ivaðust í, um tey bóru seg rætt at. Hetta sigur mær, at stórur tørvur er á eini dagføring av koyriførleikunum hjá teimum flestu.

Olga heldur, at tað hevði verið eitt fínt hugskot, um fólk til dømis annahvørt ár møttu til eitt slag av eftirmeting av tí, tey høvdu upplivað í ferðsluni.

- Innan allar aðrar útbúgvingar tosa vit jú um, at samband má vera millum teori og praksis. Men eg ivist stórliga í, hvussu nógv taka koyribókina niður aftur av hillini, aftaná at tey hava fingið koyrikort, sigur Olga.

### Vanakoyring

Olga minni eisini á, at tað allatíðina hendir okkurt nýtt á ferðsluøkinum, sum fólk antin ikki hava hoyrt um ella hava gloymt frá teoritímunum.

- Nøkur av teimum ógvusligu dømunum síggja vit til dømis fleiri ferðir um vikuna her í Klaksvík. Nógvir av teimum eldru bilførarnum høvdu ongan tíð sæð eina rundkoyring, fyrr enn vit fingu eina her í býnum. Eg upplivi framvegis at møta mótkoyrandi bilum í rundkoyringini, og eg undrist yvir, at onki álvarsligt er hent har enn.

- Í heila tiki haldi eg vanakoyring vera ein stóran trupulleika her í Føroyum. Vit hava verið ov sløv við at seta týðilig skelti upp. Ferðslan má framvegis glíða onkusvegna, so bilførarar finna sær sum frá líður sín egna máta at koma fram. Tá skeltini so umsíðir koma upp, hava fólk langt síðani gloymt, hvat tey merkja og halda fram at koyra, sum tey plaga. Hetta ávirkar allan hugburðin til ferðslu á ein óhepnan hátt, sum tey ungu eisini taka til sín.

### Skeivur miðil

- Nullhugsjónin er fyrimyndarlig, og eg taki fult undir við henni. Hvat betur kunnu vit hugsa okkum, enn at ongin fer at doyggja í ferðsluni aftur? Hinvegin skulu vit ansa eftir, at orðini ikki verða so stór, at tey verða ótrúverdug. Vit kunnu gera okkara besta, men vit kunnu ikki gera okkum til Harra yvir lív og deyð, og tann beiski veruleikin er, at ferðslan altíð fer at krevja síni deyðsoffur. Tað vita tey ungu, og tí kann ein orðing, sum "Ongin skal doyggja í ferðsluni… " skjótt blíva ein innantóm kliché.

- Í Noreg vóru vit koyrilærarar úti á gøtuni, har vit steðgaðu bilførarum til eitt prát um Nullhugsjónina. Tú kanst altíð ivast í, hvussu væl fólk lurta, men tað var í hvussu er ein rættiliga ítøkiligur máti at koma í samband við fólk.

- Eg ivist eisini í, um sjónvarpið er besti miðilin til eitt slíkt átak. Skalt tú raka flest ung fólk í senn, skalt tú gera vart við teg á telduni ella fartelefonini hjá teimum. Tað er har, tey flestu av teimum eru at finna og ikki frammanfyri sjónvarpinum beint áðrenn ella aftaná Dag og Viku. Hetta skal ikki fatast sum ein atfinning at átakinum - heldur sum nakar hugleiðingar um, hvussu átakið kundi rakað betri, sigur Olga.

### Lýsandi krossar.

Olga hevur verið við í nógvum kunningarátøkum um ferðslutrygd, bæði her heima og í Noreg, har hon tók sína útbúgving. Men royndir hava sannført hana um, at tað er hvørki tey dýrastu ella tey fínastu átøkini, sum geva best úrslit. Enn hevur Olga bert upplivað eitt átak, ið altíð fær næmingarnar í hennara bili at steðga á og hugsa.

- Tað eru blómurnar í vegjaðaranum á minningardegum yvir tey, sum eru deyð í ferðsluni. Næmingarnir leggja altíð merki til hesi blómutyssini og byrja sjálvi at tosa um tað, sum hendi á staðnum. Ofta kendu tey onkran, sum var við í ella tætt at vanlukkuni, og tí kenna tey hendingina sum ein part av teirra egna veruleika. Og so gevur tað okkum eitt nátúrligt høvi at tosa um ferðsudeyða á ein hátt, sum beinanvegin gevur meining.

- Men tá blómutyssini eru burtur, er beinleiðis áminningin tað eisini. Eg veit, at onkur heldur tað vera ósømiligt, men hví ikki merkja hesi støð við sjálvlýsandi krossum, sum standa alt árið? Øll høvdu vitað, hví teir stóðu har, og fólk høvdu fingið møguleika at gjørt sær sínar egnu tankar um tað, sum búði aftanfyri.

- Lýsingarátøk koma og fara, og vansin við teimum er ofta, at tey hugsa fyri fólk. Krossarnir skuldi verið standandi og latið fólk sloppið at hugsa sjálvi. Tí sum við øllum øðrum, er tað ikki fyrr enn fólk byrja at hugsa sjálvi, at tey byrja at broyta hugburð, sigur Olga Østerø.